# Sambandið fyrstu ferð í meira enn 60 ár

**At samgonguflokkarnir allir hava átt landsstýrisumboð í Norðoyggjum sæst ikki aftur í undirtøkuni**

VELJARAKANNING Í NORÐOYGGJUM
*Jóannes Hansen*

Fer tað at eydnast fólkaflokkinum at varðveita tveir umdømisvaldar tingmenn. Ella fer tað at eydnast tjóðveldisflokkinum fyri fyrstu ferð nakrantíð at vinna tveir umdømisvaldar tingmenn. Ella fer tað aftur at eydnast sjálvstýrisflokkinum at fáa ein umdømisvaldan tingmann.

Hetta hava verið spurningar, sum hava verið vendir í politiska orðaskiftinum í Norðoyggjum.

Spurningarnir og metingarnar eru ikki so undarligar. Valdømið hevur havt góða politiska umboðan í hesum valskeiðnum. Umframt teir fýra umdømisvaldu tingmenninar, so hevur Norðoya valdømi átt tríggjar landsstýrismenn, og teir hava ikki havt tær minstu uppgávurnar: løgmaður og formaður í fólkaflokkinum, landsstýrismaður í fíggjarmálum og landsstýrismaður í oljumálum og hesa seinastu tíðina formaður í sjálvstýrisflokkinum.

Hvussu tað verður komandi fýra árini fæst ikki at vita, fyrrenn týskvøldið 30. apríl. Men um norðoyingar fara at atkvøða soleiðis um góðar tríggjar vikur, sum teir høvdu gjørt, um val var í hesi vikuni, so hevði býtið av teimum fýra umdømisvaldu tingmonnunum verið øðrvísi, enn møguleikarnir, sum eru nevndir omanfyri.

Sambandsflokkurin hevði fingið fjórða umdømisvalda tingmannin, og fólkaflokkurin hevði mist annan av sínum. Sambandsflokkurin hevur ikki átt umdømisvaldan mann í Norðoyggjum, síðani á løgtingsvalinum, sum var 30. januar í 1940. Tá áttu Norðoyggjar tveir umdømisvaldar tingmann. Annar var Jacob Heinesen fyri fólkaflokkin (tá hann fórst við Ekliptiku kom Heine Justinussen á ting fyri hann), og hin var O. F. Joensen fyri sambandsflokkin.

O. F. Joensen ella Óli í Skúla var afturvaldur í 1943, í 1945 og í 1950, men tá var hann eykavaldur. Eli Nolsøe umboðaði sambandsflokkin í Norðoyggjum sum eykavaldur í 1978 og í 1980, men síðani 1984 hevur verið øskukalt hjá sambandinum í Norðoyggjum.

Nú bendir kanningin í hesi vikuni á, at tað aftur fer at bragda. Spurningurin er so, hvør verður valdur. Í Norðoyggjum duga tey ikki at siga, um talan er um nakað upplagt høvuðsvalevni. Á tíðindafundinum, sum sambandsflokkurin hevði fyrr í vikuni, var eitt valevni úr Norðoyggjum. Tað var Magni Laksáfoss. Seinast fekk Betta Joensen, sum umboðar flokkin í Klaksvíkar býráði, flestu persónligu atkvøðurnar, men hon er ikki á listanum hesa ferð.

### Dregur ikki

Í Danmark tosa teir um statsministereffekt. Tað vil siga, at nógvar atkvøður verða drignar til flokkin hjá forsætismálaráðharranum og serliga í valdøminum, har hann er valdur.

Sambært kanningini í hesi vikuni ger hetta seg ikki galdandi í valdøminum hjá løgmanni. Ivaleyst eigur hann einasta sessin hjá fólkaflokkinum. Jógvan við Keldu og hini á listanum skulu so kappast um næstfremsta plássið, sum ivaleyst ber pláss sum eykavaldur við sær, og triðja plássið, sum ber tingsess við sær, um Anfinn Kallsberg heldur fram í Tinganesi.

Sjálvstýrisflokkurin er illa fyri. Eyðun Elttør er vorðin formaður. Men hóast úrslitið í hansara valdømi er væl betri, enn tað er í landinum sum heild, so tykist tað ikki, sum oljumálaráðharrin verður tingmaður.

Um Karsten Hansen skal gerast tingmaður, so skal hann sambært kanningini syfta Heina O. Heinesen. Sambært kanningini letur tað ikki til, at tjóðveldisdreymurin um tveir tingmenn í Norðoyum verður veruleiki.




*Í Danmark verður tosað um statsministaraeffekt. T. v. s., at nógvar atkvøður verða drignar til flokkin hjá forsætisráðharranum. Men soleiðis tykist ikki verða hjá flokkinum hjá løgmanni. Jógvan við Keldu stendur til at fella, og tað tykist vónleyst hjá Eyðuni Elttør at vinna sær tingsess*

Lisbeth Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum:

# Bankamálið avgjørdi seinasta val

VELJARAKANNING
*Jóanes N. Dalsgaard*

Ikki óvæntað er forkvinnan í Sambandsflokkinum ógvuliga fegin um úrslitið av veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin um Portalin. Sambært kanningini fær Sambandsflokkurin 27,8% av atkvøðunum og 9 tinglimir.

- Reaktiónin hjá mær er sjálvandi gleðið. Hetta vísir, at okkara politikkur hevur fingið gróðrarfesti aftur. Vit hava nú havt eitt valskeið, har okkara mótpolur, Tjóðveldisflokkurin, hevur verið størsti flokkur. Men framanundan tí, var Sambandsflokkurin størst ur

### Seinasta val var eitt stemningsval

Lisbeth Petersen heldur, at seinasta val í stóran mun var stýrt av tí stemningi, sum bankamálið skapti í samfelagnum.

- Valið fyri 4 árum síðani var merkt av einum stemningi, sum var skaptur av bankamálinum. Nú hevur tað málið lagt seg, og fólk hava frið til at hugsa um onnur ting enn bara øsing. Fólk hugsa nú aftur um, hvussu framtíðin verður og um, hvussu gerandisdagurin verður. Og teir spurningarnar hevur Sambandsflokkurin nøkur greið svar uppá. Sambandsflokkurin heldur fast við ríkisfelagsskapin. Vit vilja modernisera og gera broytingar, men vit vilja als ikki inn uppá nakað, sum hevur við fullveldi at gera.

### Rimmar val í Vágum

Sambært veljarakanningini fær Sambandsflokkurin góð 47% av atkvøðunum í Vága valdømi. Lisbeth Petersen er eitt sindur bilsin um hetta úrslit, men hon tekur afturíaftur, at hetta er ikki heilt óvanligt.

- Tað hevur fyrr verið um reppið at vit hava fingið bæði umboðini í Vágum, so Sambandsflokkurin hevur fyrr verið stórur har.

- Hví hon heldur tú at Sambandsflokkurin stendur so sterkur í Vágum?

- Kanska hava vágafólk verið glað fyri sambandsumboðið í valdøminum, men hava verið ónøgd við umboðanina í Vágum annars. Eg taki hetta sum eitt tekin um, at okkara valevni og valdu umboð í Vágum hava duga at markera seg. Men eg taki hetta eisini sum eitt tekin um, at vit hava fingið nógvar ungar veljarar í okkara part.



*- Reaktiónin hjá mær er sjálvandi gleðið. Hetta vísir, at okkara politikkur hevur fingið gróðrarfesti aftur, sigur Lisbeth Petersen*

### Polarisering er tann sama

Lisbeth Petersen heldur ikki at úrslitið bendir á nakra stórvegis broyting í polariseringini í føroyskum politikki.

- Tjóðveldisflokkurin hevur altíð staðið fyri tí sama, men man hevur givið tí ymisk heiti í gjøgnum tíðirnar. Man hevur kallað tað loysing, og man hevur kallað tað fullveldi. Nú tosar fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum um republikk. Og tað kemur Sambandsflokkurin ongantíð at taka undir við. Vit liggja í hinum borðinum, nú saman við Javnaðarflokkinum. Hvar Fólkaflokkurin er, veit ongin rættiliga, men samanutikið kunnu vit siga, at spurningurin í føroyskum politikki framvegis er loysing /samband.

### Samgongumøguleikar

Spurd um hvørjar samgongumøguleikar hon sær fyri sær, svarar Lisbeth Petersen, at um Javnaðarflokkurin stendur við tann politikk, hann nú sigur seg at vilja føra, so kann Sambandsflokkurin saktans samstarva við hann. Men hon er tó eitt sindur fyri varin.

- Javnaðarflokkurin legði jú, í byrjanini av hesum valskeiðinum, út við at siga, at hann kundi taka undir við 1. síðu í samgonguskjalinum. Tað hevði Sambansflokkurin aldrin droymt um at gjørt. Men Javnaðarflokkurin er farin til val uppá, at varðveita ríkisfelagsskapin, og stendur hann fastur uppá tað, so eru góðir møguleikar fyri samstarvi ímillum okkum og Javnaðarflokkin, sigur Lisbeth Petersen forkvinna í Sambandsflokkinum at enda.



Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins:

# – Vit detta niður ímillum Sambandið og Tjóðveldið

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*

Formaður Javnaðarflokksins, Jóannes Eidesgaard, er als ikki nøgdur við úrslitið av nýggjastu veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Portalin. Kanningin gevur Javnaðarflokkinum 22,9% av atkvøðunum og sjey tinglimir, ið er tað sama, sum flokkurin hevur í dag.

- Við seinastu veljarakanning undan hesari fingu vit 24,3% av atkvøðunum, og tað var eitt betri úrslit fyri okkum enn hetta, sigur Jóannes.

Sambært nýggjastu kanningini, verður Sambandsflokkurin størsti flokkur við 27,8% av atkvøðunum, Tjóðveldisflokkurin næststørstur við 25,9%, Javnaðarflokkurin triðstørstur við 22,9% og Fólkaflokkurin er á fjórða plássi við 18,7%.



*- Tað undrar meg, at fólk framvegis eru so nógv upptikin av, hvat Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin halda um ríkisfelagsskapin, tí kanningarnar vísa, at tað er loysnin hjá Javnaðarflokkinum í hesum máli, sum fjøldin tekur undir við, sigur Jóannes Eidesgaard.*

### Vónsvikin

- Sum floksformaður eri eg avgjørt vónsvikin av hesum úrslitinum sum vísir, at Javnaðarflokkurin er dottin niður ímillum Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Jóannes sigur, at hesir báðir flokkarnir halda lív í hvørjum øðrum við, at annar sigur nei og hin sigur ja, og tað ger, at Javnaðarflokkurin, sum situr við tí besta boðnum um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, dettur niður í millum hinar báðar.

- Tað undrar meg, at fólk framvegis eru so nógv upptikin av, hvat Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin halda um ríkisfelagsskapin, tí kanningarnar vísa, at tað er loysnin hjá Javnaðarflokkinum í hesum máli, sum fjøldin tekur undir við.

Formaður Javnaðarflokksins legur dent á, at flokkurin hevur gjørt eitt ógvuliga gott og ábyrgdarfult arbeiði sum andstøðuflokkur, og tí undrar tað, at líkt nú er til, at flokkurin missir undirtøku til fyrimuns fyri Sambandsflokkin, sum bara sigur nei, meðan Tjóðveldisflokkurin sigur ja.

- Vit eru miðleingjan í spurninginum um viðursliftini millum Føroyar og Danmark, og tað er henni, fólk taka undir við.

### Vælferðin

Jóannes sigur, at Javnaðarflokkurin sum andstøðuflokkur hevur profilerað seg sum miðleingjan í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, og flokkurin hevur lagt stóran dent á vælferðina hjá føroyska fólkinum í sambandi við ríkisrættarligu broytingarnar.

- Úrslitið av veljarakanningini vísir, at tað, sum eftir er av tíðini fram til løgtingsvalið, mugu vit í enn størri mun enn áður royna at sannføra veljaran um, at í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark snýr tað seg ikki um eitt nei ella eitt ja, men um eina loysn, sum føroyska fólkið tekur undir við - og tað er loysnin hjá Javnaðarflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sambært kanningini fær Javnaðarflokkurin annan mannin í Sandoynni, men missir mannin í Norðstreymoy.

# Sambandið verjir borgina

**Men veljarakanningin bendir ikki á, at framgongdin skal hava uppaftur størri umboðan við sær í Eysturoy**

VELJARAKANNING Í EYSTUROY
*Jóannes Hansen*

Tað er eingin ivi. Sambandsflokkurin heldur sambært veljarakanningini í hesi vikuni væl og virðiliga tørn um støðuna sum klárt størsti flokkur í Eysturoy. Men hann megnar ikki at fáa fleiri umboð á ting enn tey bæði, sum flokkurin frammanundan hevur. Tað er annars fleiri ferðir komið fyri, at sambandsflokkurin hevur átt trý umboð í Eysturoy. Men vit skulu heilt aftur til valið 24. august í 1943 fyri at finna síðsta dømið um hetta. Ta ferðina vórðu valdir Andras Samuelsen, Johan Poulsen og Jens Chr. Olsen.

Sambært veljarakanningini verður býtið millum flokkarnar í Eysturoy, tá tað ræður umumdømisvaldu umboðini, akkurát tað sama, sum tað hevur verið fýra tey seinastu árini. Sammett við kanningina skal úrslitið á valinum broytast rættuliga fitt, um hetta býtið skal broytast.

Men tað verða undir øllum umstøðum broytingar í umboðanini. Sámal Petur í Grund hevur verið eykavalt umboð fyri sjálvstýrisflokkin. Sambært kanningini fær flokkurin ikki umboðan í tinginum eftir valið. Tað vil við øðrum orðum siga, at kappingin millum Sámal Petur í Grund, Kára P. Højgaard og Lassa Klein fer ikki at bera tingsess við sær. Men nú fáa vit at síggja.

# Hans Pauli í kløbnum tráð

**Kiksarin hjá Sambandsflokkinum í Norðstreymi tykist verða bøttur aftur, og markanti Javnaðartingmaðurin tykist hava ilt við at sleppa innaftur um tingdyrnar**

VELJARAKANNING Í NORÐSTREYMI
*Jóannes Hansen*



Tá úrslitið av løgtingsvalinum var greitt fyri fýra árum síðani kundi staðfestast, at sambandsmaðurin í Norðstreymi var fallin. Hetta var søguligt. Tí tað var fyrsta ferðin, síðani floksbýtið í 1906, at Norðstreymoyingar ikki vóru umboðaðir í tinginum av einum sambandsmanni.

Nú bendir alt á, at annar av valdømisvaldu tingmonnunum í Norðstreymi verður ein sambandsmaður. Flokkurin fer sambært veljarakanningini í hesi vikuni at taka mannin aftur, sum fólkaflokkurin fór avstað við á síðsta vali. Fólkaflokstingmaðurin Jákup Suni Joensen er ikki á listanum hesa ferð.

At sambandsflokkurin fer at fáa mannin aftur tykist rættuiga víst. Sambært kanningini eru fleir enn tíggju prosent á muni millum sambandið á fremsta plássinum og javnaðarflokkin, sum er á triðja plássinum.

Sambandið var valskeiðið 1994–1998 umboða í Norðstreymoy av Mariu Hansen, sum eisini var bygdarráðsformaður í Vestmanna. Hon stillaði ikki uppaftur fyri fýra árum síðani. Tí skal eitt nýtt sambandsumboð veljast at umboða norðstreymoyingar.

Tjóðveldisflokkurin tykist skula varðveita sín tingmann. Harvið bendir nógv á, at Hans Pauli Strøm, sum hevur umboðað javnaðarflokkin, ikki verður umdømisvaldur. Í hesum valskeiðnum hevur javnaðarmaðurin í Norðstreymi, sum í nógvum førum hevur tykst sum høgra hondin hjá floksformanninum, Jóannesi Eidesgaard, verið eykavaldur í Norðstreymi. Sambært kanningini fer javnaðarflokkurin ikki at fáa nakran eykavaldan tingmann hesa ferð.

Hetta valskeiðið hevur Norðurstreymoy átt trý løgtingsumboð. Tað tykist vera møguleiki fyri, at tað eisini verður soleiðis komandi valskeiðið. Tað kann hugsast, at triði eykamaðurin hjá fólkaflokkinum fer at fella í hesum valdøminum, men tað er væl meiri ivasamt, enn tá talan er um umdømisvaldu umboðini.

# Javnaðarflokkurin upp á pláss aftur í Sandoy

**Fólkaflokkurin tykist skula missa umdømisvalda mannin, sum teir hava havt í minsta valdøminum síðani í 1984**

VELJARAKANNING Í SANDOY
*Jóannes Hansen*

J. P. Davidsen á Sandi var tingmaður fyri javnaðarflokkin frá 1936 og til hann legði frá sær í 1970. Tá tók Tórálvur Mohr Olsen við. Í 1978 misti javnaðarflokkurin tingmannin í Sandoyar valdømi. Teir fingu hann aftur á valinum í 1980, og so høvdu teir hann fram til valið fyri fýra árum síðani. Nú tykist javnaðarflokkurin í Sandoyar valdømi so at siga at koma upp á pláss aftur. Sambært veljarakanningini í hesi vikuni verður hann størsti flokkur í valdøminum.

Men tað verður í stórari kapping við tjóðveldisflokkin, sum vann tingmannin fyri fýra árum síðani, og sum rættuliga tykist hava vunnið takið aftur á sandoyingum, sum hann hevði fyri fjøruti árum síðani, tá Erlendur Patursson var umboðaði flokkin í Sandoyar valdømi.

### Fólkaflokkurin fyri skrædli

Siðani 1984 hevur fólkaflokkurin í Sandoy átt støðuga umboðan í løgtinginum. Í kanningini í hesi vikuni er ein lítil triðingur av veljarunum í valdøminum spurdur, hvønn tey høvdu valt, um val hevði verið nú. Sambært svarini eru vánirnar hjá fólkaflokkinum at endurvinna sessin ikki góðar. Tað eru næstan ellivu prosent frá fólkaflokkinum og upp til javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin.

Síðani 1988 hevur John Petersen verið valdur tingmaður fyri fólkaflokkin í Sandoyar valdømi. Tá hann segði tingsessin frá sær, tí hann fyrst varð valdur til landsstýrismann og síðani fór heilt burturúr politikki, hevur Eyðun Viderø verið tingmaður. Hann umboðaði flokkin í tinginum 1978–1980 og 1984–1988.

Sambandsflokkurin hevur ongantíð átt tingmann í Sandoyar valdømi. Tað tykist hann heldur ikki skula fáa hesa ferð, men hann er nú triði størsti flokkur í valdøminum.